# Kunnandi fundur um mentan

Norðurlendski Mentunargrunnurin hevur kunnandi fund í Klaksvík fyri øllum áhugaðum í Býráðshøllini í Klaksvík í kvøld 19. november frá klokkan 19 til 22. Av teimum 26-28 mió krónunum, sum árliga verða játtaðar úr Norðurlendska Mentanargrunninum til mentanarátøk í norðurlondum og uttanfyri norðurlond, eru Føroyar vanliga væl umboðaðar. Grundarlagið undir játtan og útgjaldi til mentanarátøk úr grunninum eru vanliga, at trý norðurlond skulu verða umboðað í verkætlanini. Eitt av høvuðsmálunum hjá umsitingini í grunninum er at kunna og vegleiða umsøkjarum so gjølla sum tilber, at umsóknin er so greið, nágreinlig og væl skrivað, sum gjørligt. Thomas Heikkila, málsviðgerði í Mentanargrunninum kunnar um grunnin og greiður frá, hvussu fram verður farið, tá søkt verður um pening. Á hesum fundum fer Thomas Heikkila at greiða frá Norðurlendska Mentanargrunninum og Urd Johannesen, fer stutt at kunna um grunnin Kulturkontakt Nord. Fundurin er fyri øll, ið hava brúk fyri at søkja um norðurlendskan pening til mentanarátøk.



# gerð

sjálvandi til stórt fortreð fyri sjúklingar, sum verða noyddir at ganga sjúkir og sjúkrameldaðir frá arbeiðið longri enn annars.

- Men hetta er so prísurin fyri tær raðfestingarnar, sum gjørdar vórðu, leggur hann afturat.

### Brúkt tíðina væl

Men hvussu ber tað til, at læknar og sjúkrarøktarfrøðingar, sum kortini eru til arbeiðis, ikki kunnu leggja fólk undir skurð?

- Tað er tí, at vit hava tálmað útreiðslurnar til ymsa útgerð, sum skal brúkast í sambandi við skurðviðgerðir. Samstundis er ein seingjadeild við 10 sengrum til hesar skurðsjúklingar, afturlatin og tí ber ikki til at leggja fólk undir skurð.

Tað merkir, at ein partur av virkseminum, sum varð tálmað í sambandi við summarfrítíðina, verður ikki tikið upp aftur fyrrenn á nýggjárinum.

Allan Skaalum sigur, at tey hava roynt at fáa sum best burtur úr bíðitíðini. Eitt nú er ein rúgva av yvirtíð nú fingin frá hondini við avspáking, heldur enn við yvirtíðargjaldi.

Samstundis hevur Landssjúkrahúsið í ferð við at seta eina talgilda heilsuskipan, THS, í verk og tað hava vit lagt stóra orku í at venja starvsfólkið til í summar.

- Tað er ein rættiliga umfatandi skipan, sum krevur góða venjing og vit hava brúkt hetta høvi við lágum virksemi til at undirvísa starvsfólk.

Sostatt hava vit brúkt tíðina skilagott og tað fer avgjørt at koma sjúklingunum til góðar í longdini, sigur Allan Skaalum.

Hann kann onki siga um, hvussu virksemið verður næsta ár, tí tey eru í hesum døgum í eini tilgongd at leggja játtanina fyri næsta ár til rættis.

Les meiri á síðu 7.

# Futt í Býin og G! í kapping

**Komandi ár verða tónleikatiltøkini G!-festivalurin og »Futt í Býin«, ið ólavssøkukonsertin nú kallast, samstundis. Fyrireikararnir halda hetta vera sera óheppið og kenna seg kroystar í hesi støðu**

TÓNLEIKUR

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Bæði tiltøkini hava verið væl vitjaði, so tað er sera óheppið at tey nú liggja sama dag.*
*Savnsmynd: Jens Kristian Vang*

Hóast nógvur munur er á tiltøkunum, eru báðir fyrireikararnir, Jóhannus á Rógvu og Jón Tyril, á einum máli um at tað ikki kemur nøkrum til gagns at bæði Futt í Býin OG G! koma at liggja á sama degi í 2009.

Í ár var fyrsta árið tiltakið Futt í Býin sá dagsins ljós. Ólavsøkukonsertin fylti ov nógv, og mátti tí leggjast uttanfyri sjálva Ólavsøkuna, mettu myndugleikarnir, ið kravdu hetta.

- Seinasta ár eydnaðist tað ikki, men ætlanin er at hava konsertina leygardagin undan Ólavsøkuni, komandi ár verður tað 25. juli. Hagtøl, frá tá konsertin var 27., vísa, at hon verður mest vitjað leygardagar, greiðir Jóhannus á Rógvu frá. Umframt at hava flutt dag, so er konsertin flutt úr Kommunuskúlagarðinum oman í Tórsgøtu.

G!-festivalurin verður eisini í ár og kemur at liggja í døgunum 23., 24. og 25. juli. Jón Tyril greiðir frá, at orsøkin til at hann kom at liggja har, er, at tað var í samráði við nýstovnaða Føroya Festivalin, ið verður vikuskiftið frammanundan og í Kirkjubø.

- Men vit gjørdu ein feil við at leggja G! á tann 25.. Ólavsøkukonsertin plagar at vera 27., og vit vistu ikki av ætlanum teirra tá vit løgdu G!, sigur Jón Tyril. Bæði Føroya Festivalin og Futt í Býin høvdu samskift við G! áðrenn skráin varð løgd, men kortini legði Futt í Býin seg omaná G! hin 25.

- Í 2010 verður G!-festivalurin triðja vikuskifti í juli, sum vanligt hevur verið leggur Jón Tyril afturat.

### Hørð kapping?

Bæði eru tey tónleikatiltøk, men kortini er stórur munur á teimum, so torført er at meta um kappingartreytirnar. Víst vitja nógv Ólavsøkuna og fara tí á konsertina, ið hoyrir við, og uttan iva velja nógv G! framum, orsakað av umhvørvinum, tjaldingini og longdini av festivalinum. Eisini umboða báðir festivalarnir ymiskan tónleik.

Hvørgin av fyriskiparunum ynskti at skula kappast á hendan hátt. Báðir vildu vera við, at teir høvdu verið um seg og spurt um nakað annað lá á teimum døgum, ið ætlað var at nýta.

Jóhannus á Rógvu legði afturat at Futt í Býin hevði havt sera nógv samskifti við aðrar festivalar, tí ætlanin er sjálvsagt at samskipa alt best møguligt. Millum annað er ein MVG fyrispurningur lagdur til Mentamálaráðið vegna festivalarnar.

- Futt í Býin er eitt nýtt tiltak, ið má byggjast sterkt upp frá grundini av. Tí er tað so týdningarmikið at vit halda fast við at leggja konsertina leygardag, sigur Jóhannus á Rógvi.

# Støðan á Landssjúkrahúsinum ein gøla

**Politikarar í Løgtinginum undrast á, at, Landssjúkrahúsið ikki hevur ráð at leggja sjúklingar undir skurð**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta er ein skandala.

Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, vildi hava eina forkláring upp á, hvussu tað ber til, at sjúklingar ikki kunnu leggjast undir skurð, tá ið bæði læknar og sjúkrasystrar gingu fyri fulla løn kortini.

Í løgtinginum nú ein dagin dugdi hann ikki at síggja, hvussu stór sparing er í at forða læknum og sjúkrarøktarfrøðingum, sum kortini eru til arbeiðis, ið at leggja fólk undir skurð.

Hann vísti á, at allar skurðviðgerðirnar, sum eru útsettar í ár, skulu so gerast næsta ár. Tí vildi hann hava at vita, hvat tað fer at merkja fyri raksturin á Landssjúkrahúsinum næsta ár, at ein stór rúgva av útsettum skurðviðgerðum frá ið ár, eisini skulu gerast næsta ár.

Jenis av Rana, sum sjálvur er kommunulækni, váttaði í Løgtinginum, at bíðitíðirnar á Landssjúkrahúsinum eru langar.

Men hann vildi ikki vera við, at tað var peningur, sum manglaði.

Tær longstu bíðitíðirnar eru á økjum, har játtanin ikki er ov lítil, staðfesti kommunulæknin í Løgtinginum.

Marjus Dam, sum eisini er kommunulækni, staðfesti eisini, at hóast bæði læknar og sjúkrarøktafrøðingar eru til arbeiðis fyri fulla løn, sleppa tey ikki at leggja fólk undir skurð, tí pengarnir strekkja ikki til.

- Hvat skulu tey so gera, tá ið tey eru arbeiðis, tá ið tey ikki sleppa at leggja fólk undir skurð, spurdi hann.

Hinvegin váttaði hann, at skurðviðgerðir eru útsettar upp í eitt heilt ár og ímeðan skulu sjúklingar ganga sjúkrameldaðir í nógv longri tíð enn neyðugt, tí politikararnir ikki játta landssjúkrahúsinum nóg mikið av pengum, til at viðgera hesar sjúklingar fyri.

### Máttu tálma

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, staðfesti, at longu tíðliga í ár staðfesti landssjúkrahúsið, at brúk var fyri 30 milliónum afturat í ár, skuldi virksemið halda fram óbroytt.

Men kravið frá undanfarnu samgongu var, at Landssjúkrahúsið skuldi spara tvær milliónir og skuldi eykajáttan útvegast til tær 28 milliónirnar, sum so manglaði í.

Landssjúkrahúsið segði, at tað bar ikki til at finna tvær milliónir í sparingum við uppsagnum. Tí varð virksemið tálmað fyri at spara tvær milliónir.

- Sostatt vóru ein rúgva av skurðviðgerðum útsettar til seinni. Tað er ikki so, at allar tilrættislagdar skurðviðgerðir eru útsettar, men ein stórur partur er útsettur fyri at kunna spara tær tvær milliónirnar.

Annars vóru tað fleiri politikarar, sum hartaði politikarar fyri at hava játtað Landssjúkrahúsinum alt ov lítið av pengum fyri at pyntað figgjarlógina.

Les meiri á síðu 6.